# Á útoyggj at gera samfelagstænastu

**- Hví ikki senda fólk, sum skulu inn at sita fyri rúsdrekkakoyring, út á onkra útoygg at gera samfelagstænastu í staðin? Tey høvdu verið ein stór hjálp hjá okkum, samstundis sum tey fingu nakað meiningsfult at fara upp til, heldur Tummas Frank Joensen úr Skúvoy**

ÚTOYGGJAR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Mynd: Bárður Lydersen*

Nú Útoyggjastevna var um vikuskiftið, komu nógv áhugaverd hugskot fram, um hvat kundi verið gjørt á útoyggjunum til gleði og gagn fyri bæði útoyggjafólk og fólk á meginlandinum. Fólk vóru á einum máli um, at við eitt sindur av nýhugsan ber mangt til, sum vit bara ikki hava givið okkum far um fyrr

### Samfelagstænasta

Tummas Frank Joensen úr Skúvoy er ein av teimum, sum er sannførdur um, at hugflog og áræði eru bestu amboðini til at skapa arbeiðspláss og betri liviumstøður hjá teimum, sum búleikast á útoyggj. Og nógv av tí, sum kundi verið gjørt, hevði eisini komið restini av føroyska samfelagnum til góðar.

- Hví ikki til dømis senda tey, sum skulu inn at sita fyri rúsdrekkakoyring, út á onkra útoyggj at gera samfelagstænastu? Eg skuldi fegin tikið ímóti teimum, tí í Skúvoy er meir enn ríkiligt hjá teimum at fara í holt við, sigur Tummas Frank. Sum dømi um slíkt arbeiði nevnir hann rásirnar í berginum, sum treingja til ábøtur, skera upp haga og velta, grava veitir, hegna og mangt annað.

Tað er neyvan nakar ivi um, at ein slík skipan uppá nógvar mátar hevði verið ein fyrimunur fyri samfelagið. Samfelagstænasta er ólønt arbeiði, sum tann dømdi verður settur at gera í síni frítíð. Tað merkir sostatt, at hann ikki verður noyddur at forsøma sítt egna arbeiði eins og tey, ið fara inn at sita. Hartil verður tann dømdi framvegis búgvandi heima hjá sær sjálvum saman við familjuni.

- Fólk, sum eru dømd fyri rúsdrekkakoyring, eru jú ikki vandamiklir brotsmenn ella vánalig menniskju. Tey hava bara traðka við síðuna av, og tað er rættiliga ivasamt, hvussu nógv tað hjálpir at tveita tey í geglið. Tað mátti verið munandi meir meiningsfult at ganga úti í náttúruni og gera okkurt til nyttu enn at sita í Jónas Bronksgøtu, og gløða inn í ein gráan vegg, sigur Tummas Frank avgjørdur.

Hann heldur avgjørt, at hetta er eitt hugskot, sum Politiið ella Kriminalforsorgin átti at kanna nærri. Í teimum londum, har tað er meir vanligt at døma fólk til samfelagstænastu, bendir alt nevniliga á, at hesi fólkini fella lættari inn í samfelagið aftur enn tey, ið hava sitið í fongsli.

### Lívsvirði

Tummas Frank leggur áherðslu á, at hugskotið við samfelagstænastu ikki snýr seg um, at útoyggjafólk skulu fáa stórarbeiði gjørd fyri onki, men heldur um at seta nakað í verk, sum øll kunnu hava gleði av. Hetta kundi so eisini verið við til, at onnur enn bara útoyggjafólk fáa innlit í, hvussu tað er at liva og búgva á eini útoyggj.

- Tað er jú ein orsøk fyri, at summi av okkum vilja vera búgvandi herúti. Tað snýr seg um lívsvirði, um at eiga seg sjálvan og síggja síni børn vaksa upp tætt at náttúruni og læra tey at virðismeta tað, hon gevur. Tað hevði verið so lætt bara at flutt til Havnar, men tað eru also ikki øll, sum halda tað vera líka lokkandi at sita í einum fínum húsum uppi í Hoyvík við eini skuld uppá 1 1/2 milliónir og ikki hava tíð at liva, sigur Tummas Frank Joensen.



*- Fólk, sum eru dømd fyri rúsdrekkakoyring, áttu at fingið møguleika at gjørt samfelagstænastu á eini útoyggj, heldur enn at verða tveitt í geglið, heldur Tummas Frank Joensen úr Skúvoy*

# Útoyggjafelagið havt aðalfund

**Nevndin í Útoyggjafelagnum varð afturvald og umboðsráðið staðfest á aðalfundinum hjá felagnum, sum var hildin á Útoyggjastevnuni úti í Svínoy leygardagin**

AÐALFUNDUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Bárður Lydersen*



*Øll nevndin í Útoyggjafelagnum var afturvald á aðalfundinum úti í Svínoy leygardagin*

Seinastu fýra árini hevur aðalfundurin hjá Útoyggjafelagnum verið hildin á árligu Útoyggjastevnuni. Í ár var aðalfundurin sostatt hildin úti í Svínoy á Útoyggjastevnuni leygardagin, har millum annað val av formanni og nevnd var á skránni.

### "Ein framtíð á útoyggj"

Í formannsfrágreiðingini fjaldi Óla jákup úr Dímum ikki út yvir, at arbeiðið hjá Útoyggjafelagnum onkuntíð minti mest um vælgerðandi arbeiði, sum mest varð gjørt av idealistiskum orsøkum. Hann vildi tí ynskt, at hetta arbeiðið kundi komið upp á eitt meir professionelt støði, men enn er tað ikki eydnast at fáa neyðuga peningin settan av á fíggjarlógini. Kortini fegnaðist hann um, at alt nú bendir á, at felagið í størri mun verður hoyrt á rætta stað, og at tað í heila tiki gongur betri at samskifta við politikarar og mynduleikar um útoyggjamál.

Aftaná formannsfrágreiðingina legði Olga Biskopstø fram menningarætlanina "Ein framtíð á útoyggj". Ætlanin leggur í høvuðsheitum upp til, at útoyggjafolk standa saman um at finna styrkir og veikleikar í fólkagrundarlagnum og harvið fáa eina realistiska mynd av, hvat eitt øki kann fara undir at fyriskipa á vinnuøkinum. Verkætlanin "Mentanarsøgulig landsløg" er ein annar aðaltáttur í framtíðarætlanunum hjá Útoyggjafelagnum. Hetta átakið verður skipað sum eitt slag av skúla ella útbúgving innan gamalt hondverk, siðsøgu og mentan, bæði við atlitið til ferðavinnuna og næmingar og lærlingar á miðnámsútbúgvingum.

Í nýggjastu Glóðini, sum kom út í sambandi við Útoyggjastevnuna, er millum annað ein nágreinilig frágreiðing um menningarætlanina "Ein framtíð á útoyggj"

### Nevndin afturvald

Á aðalfundinum var øll nevndin í felagnum afturvald við Óla Jákupi úr Dímum sum formanni, Olgu Biskopstø sum skrivara og Esbern í Eyðansstovu sum nevndarlimi. Eisini var umboðsráðið hjá felagnum staðfest á fundinum.

Umboðsráðið er hægsti myndugleiki felagsins millum aðalfundirnar, og er mannað av einum umboði úr hvørjari bygd/oyggj. Umboðsráðið setur út í kortið og leggur tær stóru linjurnar fyri felagið við støðið í tí, sum fólki í hvørjari einstakari oyggj ynskir. Tað eru bygdadeildirnar hjá Útoyggjafelagnum, ið velja hvør sítt umboð í umboðsráðið, sum í løtuni er mannað soleiðis:

Signhild Joensen, Trøllanes, formaður, Harry Jensen, Skúvoy, næstformaður, Óli á Geilini, Svínoy , skrivari, Laura í Frammistovu, Kirkja og Hattarvík, Poulina Eliasen, Syðradalur, Fríða Isaksen, Húsar, Ragna Glerfoss, Mikladalur, Katrina Johannesen, Mykines, Bjørn Patursson, Koltur, Sanna Silvurstein, Hestur og Jógvan Jón Petersen, Stóra Dímun.